stuðulsfólkaskipanin fyri børn
www.almannastovan.fo

## Sóknast verður eftir *náttarstuðlum* til Streymoyar og Eysturoyar øki

Søkt verður eftir álítandi hjálparfólkum at vera náttarvakt heima hjá børnum, ið bera brek. Søkt verður bæði eftir fólki til føst størv og eftir avloysarum.

Arbeiðsstaðurin er heima hjá børnunum, og umráðandi er tí, at náttarstuðlarnir duga at laga seg til og at virða umstøðurnar í heiminum.

Náttarstuðlarnir fara at vera savnaðir í eitt røktartoymi. Í toyminum fer stórur dentur at vera lagdur á førleikamenning innan røkt og kreppustøður.

Fyri at tryggja børnunum tann stuðul teimum tørvar, er neyðugt at toymið lagar seg til umstøður, ið tíðum broytast. Stuðulsfólk kunnu tí vænta, at verða biðin at arbeiða við ymiskum børnum, tá aðrir stuðlar hava forfall, ella tá umstøðurnar annars gera tað neyðugt.

Søkt verður bæði eftir fólki við útbúgving innan heilsu- og røktarøkið, og eftir ófaklærdum hjálparfólkum.

## Sóknast verður eftir *stuðlum* til meginøkið

Søkt verður eftir fólki til ansing, røkt og fylgjarauppgávur. Uppgávurnar eru nógvar og fjølbroyttar. Arbeiðstíðin er skiftandi, og kann eisini fara útum vanliga arbeiðstíð. Í løtuni eru arbeiðsuppgávurnar í meginøkinum.

Arbeiðsuppgávurnar og tíðirnar vera lagaðar til tørvin hjá børnunum, ið fáa stuðul. Talan er tí vanliga um ymiskar samansettar uppgávur, ella at stuðlar arbeiða niðursetta tíð.

Søkt verður tí bæði eftir fólki sum ynskja at arbeiða sum stuðulsfólk burturav, og eftir hjálparfólki, sum ynskja at arbeiða nakrar tímar um vikuna. Tí eru lesandi, eitt nú innan heilsu- og námsfrøði eisini vælkomin at søkja.

Størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag. Fevnir sáttmálin hjá yrkisfelagnum ikki um størv ið líkjast hesum, verður lønt sambært sáttmála fyri hjálparfólk millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

Umsóknarfreistin er 13. november 2007 kl. 12.00. Skrivlig umsókn og møgulig prógv og viðmæli skulu sendast til:

Stuðulsfólkaskipanina fyri børn, Almannastovan, Tinghúsvegur 14, Postboks 3096, 110 Tórshavn.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til stuðulsráðgevararnar, allar yrkadagar millum kl. 10 og 15 á tel. 35 35 70.

KREA

FVE FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ
The Faroe Islands Fisheries Inspection



# 1. MEISTARI TIL FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ

Tvey føst størv og eitt avloysarastarv sum 1. meistari við skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verða hervið lýst leys, at seta sum skjótast.
Avloysarastarvið kemur at vara til 24. mai 2008

**Starvið fevnir m. a. um hesar uppgávir**
- Vaktgangandi maskinmaður sambært ásetingunum frá maskinstjóra
- Skipa fyri og luttaka í dagliga arbeiðinum í maskinrúmunum, og rúmum sum beinleiðis hava samband við maskinrúm, umframt rúm har maskinútbúnaður er
- Skipa fyri viðlíkahaldi sambært viðlíkahaldsskipan
- Annað fyrifallandi viðlíkahaldsarbeiði

**Førleikakrøv**
- Vinnubræv sum Skipsmaskinmeistari á 1. stigi (STCW-regl. III/2 as 2nd Engineer).
- Fyrimunur við 3 ára maskinmeistaraútbúgving
- Heilsuváttan fyri sjómenn
- Leiðsluroyndir
- Góðan førleika at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa
- Prógv, so sum trygdarskeið, eldsløkking, fyrstuhjálp, vinnukavari og onnur ið eru viðkomandi fyri starvið. Fyrimunur er við gildugum prógvum.
- Aldur og heilsu til at gerðast vinnukavari. Fyrimunir men ikki krav.

**Setanartreytir**
Føstu størvini er tænastumannastørv og lønt í 31. lønarflokki sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarfelagið. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnum undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Fiskiveiðieftirlitið. Starvsheiti er 1.meistari. Tann ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipa til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

Fyri avloysarastarvið galda treytirnar í avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarfelagið.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn við: CV, avrit av prógvum fyri førleikakrøv og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 12. november 2007 kl. 1400.

**Umsóknirnar skulu sendast til:**

**Fiskiveiðieftirlitið**
Postsmoga 347
110 Tórshavn
att: Jóannes Heimustovu

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 35 30 30 og tosa við Jóannes Heimustovu. Henda lýsing er eisini á heimasíðuni www.fisk.fo.

www.fisk.fo